# Sjampanjubrúsur og gullrúsur á Tvøroyri

**Tað var rómur í høllini í Trongisvági, tá ið flogbóltskvinnurnar hjá TB fingu medaljurnar fyri Føroyameistaraskapi ð handað sunnudagin**

FØROYAMEISTARAR
*Áki Bertholdsen*



*Hetta er manningin, sum vann TB heiður og æru í flogbólti í ár. Aftara rað frá vinstru eru tey, Romika Øster, sum hevur vant tær á liðnum, sum búgva í Havn og sum kanska verður venjari næsta ár. Síðani eru tær Gudrid Nolsøe, Maja Popovic, Ingun Midjord, Tórbera Joensen, Svanna Nielsen og Virgar Djurhuus, venjari. Fremra rað frá vinstru eru tær Annemia Johannesen, Guðrun Dimon, Harriet Hammer, Tóra Mortensen og Winnie Djurhuus*

– Gullið og heiðurin er tykkara, men æruna eigur øll bygdin.

Við hesum orðunum ynskti Sofus Laðanberg, formaður í TB flogbóltskvinnunum á Tvøroyri tillukku við tí óføra bragdi, tær hava avrikað í ár.

Tað var veitslurómur í ítróttarhøllini á Tvøroyri sunnudagin, tá ið meistarakvinnurnar á Tvøroyri fingu steyp og gullheiðursmerki um hálsin sum sjónliga prógvið um, at í ár eru tær bestar í landinum.

Seinastu dysturin í ár var ímóti ÍF og hóast TB longu hevði tryggjað sær FM heitið, lógu tær ikki á latu síðuni, men endaðu kappingarárið sum tað sømir seg við at vinna dystin sannførandi 3-0.

Aftaná dystin, handaði umboð fyri Flogbóltsamband Føroya teimum steyp og gullmedaljur.

Niclas Joensen frá Flogbóltssambandinum var komin suður til dystin og við sær hevði hann bæði eitt ognarsteyp til minnis um FM heitið og eitt ferðasteyp, sum liðini skulu kappast í fleiri ár um at fáa til ognar, umframt gullmedaljurnar.

Tað er Føroya Sparikassi, sum hevur latið bæði steypini.

Tað vóru Finnleif Guttesen og Sverri Midjord, næstformaður í ÍSF, sum fingu heiðurin at handa teimum steypini og Niclas Joensen hongdi medaljurnar um hálsin á spælarunum.

Niclas Joensen helt tað vera serliga stuttligt at flogbólturin hevði so stóra undirtøku á Tvøroyri og hann helt neyvan, at tað nakrantíð varð komið fyri fyrr, at ein flogbóltsdystur hevði savnað eina fulla høll.

Funnleif Guttesen helt tað var ein stórur heiður fyri seg at sleppa at handa teimum steyp fyri tað stóra avrikið og hann helt, at tey høvdu gjørt eitt ótrúligt arbeiði.

Sverri Midjord segði, at hetta var størsta ítróttarhending í høllini á Tvøroyri og at tað var eyðsæð, hvønn týdning hon hevði havt. Ikki minst helt hann tað vera hugaligt, at tað hendi júst 20 ár eftir, at høllin varð tikin í brúk.

Hann mintist á, at teir fyrstu, sum spældu flogbólt í Føroyum, vóru lærararskúlanæmingar undir leiðslu av Martini Holm

Ein av teimum, sum gingu á læraraskúla tá, vóru Hovgrímur Hammer av Tvøroyri, sum eisini átti sínm lut í, at ítróttarhøllin á Tvøroyri varð bygd.

Formaðurin í TB, Sofus Laðanberg, segði, at TB hevði havt nógvar glæsiligar løtur, men at hetta var ein av teimum stóru. Hann segði, at gullið átt TB kvinnurnar, men æruna átti øll bygdin.

Frá áhugaferlagnum hjá TB, handaði hann liðnum einn kekk upp á 5.000 krónur. Harumframt fingu tær blomstur fleiri staðni frá.

Umframt FM heitið hevur TB, sum kunnugt eisini vunnið steypakappingina, so í ár eru tær greipuvinnarar.

Og at flogbólturin er við at gerast fólksins ítrottur á Tvøroyri fekst sjónligt prógv um sunnudagin, tí høllin var at kalla fullsett av fólki, sum var komin at heiðrað flogbóltskvinnurnar hesa stóru løtu og tað man vera sjáldan, at ein flogbóltsdystur í Føroyum hevur savnað 350 áskoðarar.



*Tá ið medaljurnar vóru komnar um hálsin at hanga, var stundin komin til sjampanjuna. Tóra Mortensen hevur fingið tundurproppin av og sprænurin stendur undir loftið. Liðskiparin, Svanna Nielsen, fremst á myndini, heldur armin upp fyri andlitið fyri ikki at fáa karm*



*Flogbóltsáskoðari nummar eitt á Tvøroyri, Anna Djurhuus, fegnaðist sum vera man um avrikið hjá flogbóltskvinnunum, her er hon saman við formanninum í TB, Sofus Laðanberg*

## Norðborg úr Klaksvík fingið 250.000 krónur í bót



*Ólógligur fiskiskapur hevur um vikuskiftið kostað Norðborg 250.000 krónur í bót*

**– Norðborg er tikin fyri ólógligan fiskiskap í Noregi og er farin aftur til fiskiskap**

ÓLÓGLIGUR FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Um vikuskiftið varð nótaskipið Norðborg úr Klaksvík tikið fyri ólógligan fiskiskap í Noregi. Tað var norska vaktarskipið, Barentshav, ið tók Norðborg seinnapartin fríggjadagin, sambært norska blaðið Aftonbladet.

Norðborg varð biðin um at fylgja við inn til Kirkenes í Norður-Noregi og har góðtók skiparin at betala 250.000 krónur í bót, hava keldur upplýst fyri Sosialinum.

Felagið, sum eigur Norðborg hevur ongar upplýsingar um málið, uttan at okkurt hevur verið galið.

Men sambært Aftenposten er Norðborg tikin fyri at hava blakað 52 tons av lodnu fyri borð. Teir hava fiskað lodnu til matnað til japanska marknaðin, men hesi 52 tonsini, teir eru skuldsettir fyri at hava blakað útaftur, var slíkt, sum ikki kundi brúkast til tað endamálið og tí hava teir koyrt tað fyri borð aftur Eftir at skiparin hevur góðtikið bótina, er Norðborg aftur farin til fiskiskap.



# 2-3 VHF-støðir aftrat høvdu givið nøktandi radiodekning

**Hvør VHF-støð kann væntast at kosta umleið 1-1,5 milj. kr. Landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, hevur mælt landsstýrinum til at útbyggja VHF-sendinetið og hevur eitt samt landsstýrið tikið undir við hesum.Tað var Rúna Sivertsen, sum setti landsstýrismanninum nakrar fyrispurningar um VHF-sendinetið.**

VHF-SENDINET
*Vilmund Jacobsen*



*Í viðmerkingum sínum til fyrispurningin um VHF-sendinetið, vísti Rúna Sivertsen á, at illgruni er um, at neyðarkall frá monnum, sum eru burturgingdir, ikki eru hoyrd.*
*- Hetta kann ein fiskivinnutjóð ikki liva við, segði hon.*



*Tann nýggja VHF-DSC-skipanin virkar á tann hátt, at tá ið menn trýsta á ein neyðknøtt, fær Tórshavn Radio og bátar, sum eru útgjørdir við hesi skipan, boð um neyðstøðuna beinanvegin*

Í gjár svaraði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, muntligu fyrispurningunum hjá Rúnu Sivertsen, løgtingskvinnu, um hoyrilíkindini hjá bátum í føroyskum sjóøki.

Rúna setti landsstýrismanninum 5 spurningar, 1. Á hvørjum økjum røkkur VHFsendinetið ikki? 2. Eru kanningar gjørdar, sum siga, hvar VHFsendinetið ikki røkkur? 3. Hvat kostar at útbyggja VHFsendinetið, so øll økir verða rokkin? 4. Nær verður VHFsendinetið útbygt, soleiðis tað røkkur øllum leiðum á føroyskum sjóøki og 5. Er lógarfest, at bátar, fevndir av løgtingslóg nr.

72 frá 13. mai 1992, skulu lurta á neyð og kallibylgjuni (kanal 16)? Í svari sínum til tveir teir fyrstu spurningarnar, sigur landsstýrismaðurin, at ongar nágreiniligar kanningar eru gjørdar yvir, hvar VHF-tænastan røkkur á innaru føroysku landleiðini. Í hesum sambandi vísir hann til svar frá Telefonverk Føroya Løgtings til landsstýrið í august 1990.

Her verður nevniliga víst á, at ongar nágreiniligar kanningar eru gjørdar.- TFL vísir tó á, at manningin á vaktarskipinum Tjaldrinum gjørt eina upptekning í 1983. Henda upptekningin vísir, at tað serliga er trupult at fáa samband við Tórshavn Radio yvir VHF-radioskipanina, um skip og bátar eru stødd norðanfyri inni undir landi, eitt nú í Vestmannasundi, Djúpunum (norðast) og á ávísum støðum í Kallsoyarfirði. Hinvegin vísir upptekningin í sunnara partinum av Føroyum ikki vísir á hesar trupulleikar.

Í svari sínum vísir landsstýrismaðurin eisini til ávegis notat um VHF-dekning í Føroyum. Hetta notat, sum Føroya Tele hevur gjørt, er latið Bjarna Djurholm, 24. januar 2002. Her verður endurtikið, at ongar rættiligar kanningar eru gjørdar til tess at meta um kostnaðin av at útbyggja VHF-sendinetið soleiðis, at allar tær innaru leiðirnar verða dekkaðar. Føroya Tele mælir til, at gjørd verður ein forkanning.

## Kostnaður og útlit

Í svari sínum til spurning 3 og 4, vísir landsstýrismaðurin á, at radiogrundaða neyð og trygdartænastan á havinum nú er yvirtikin 1. februar 2002. Í hesum sambandi hevur landsstýrismaðurin sett eina forkanning í verk. Endamálið er at klárleggja VHF-útbreiðsluviðurskiftini í Føroyum og at gera eitt uppskot til útbyggingarætlan við kostnaðarætlan; at leggja tilrættis og gera eftirlitsmátingar kring oyggjarnar og at gera eitt tilmæli til støðutakan.

- Arbeiðsætlanin í uppskotinum er í fyrsta lagi ein teoretisk forkanning, sum skal klárleggja útbreiðsluviðurskiftini við 150 170 MHz. Eisini skal kannast, hvussu er við reflektiónum (afturkasting), og hvussu radiosignalini brótast um fjallarøðir í føroyska lendinum – hvussu stórur partur av radiosignalunum, sum raka eina fjallasíðu, verða kastað aftur. Í øðrum lagi skal gerast eitt uppskot um útbyggingarætlan saman við eini kostnaðarætlan.

Landsstýrismaðurin metir, at ein tílík forkanningin kann verða liðug umleið 1. juni 2002.

- Henda forkanningin skal eitt nú staðfesta, hvat tað kostar at útbyggja VHF-sendinetið, men nær netið verður útbygt, veldst um møguliga játtan til útbyggingina.

## 3-4 støðir aftrat

Landsstýrismaðurin sigur, at sannlíkindini fyri, um tað hoyrist ella ikki, er tengt at radiosignalunum – og serliga, tá ið talan er um signalir, sum eru afturkastað frá fjallasíðum og signal, sum eru bend/brotin um fjallarøðir.

- Talan verður sostatt ongantíð um 100% radiodekning, men til ber at koma ógvuliga tætt hesum, t.d. at VHF'urin hoyrist í 99,5% av støðunum og 99% av tíðini í einum ávísum øki. Somu viðurskifti gera seg galdandi, tá ið tú kemur langt til havs. Tá gera ymiskt viðurskifti í atmosferuni seg galdandi, t.d. hvussu býti av vætu og regni er í mun til hæddina yvir havinum.

Hann vísir á, at hóast stutt er komið ávegis við kanningini, eru ávísar ábendingar um, at 2-3 VHF-støðir aftrat høvdu givið nøktandi radiodekning í mun til umstøðurnar.

- Hvør VHF-støð kann væntast at kosta umleið 1-1,5 milj. kr. Eg havi mælt landsstýrinum til at útbyggja VHF-sendinetið og hevur eitt samt landsstýrið tikið undir við hesum, sigur Bjarni Djurholm.

## Skulu skip og bátar lurta?

Rúna Sivertsen spurdi eisini, um tað er lógarfest, at bátar, fevndir av løgtingslóg nr. 72 frá 13. mai 1992, skulu lurta á neyð-og kallibylgjuni, kanal 16.

Um hesa skyldu ella ikki, vísir landsstýrismaðurin til, at hetta er eitt málsøkið hjá Fiskimálastýrinum.

- Øll skip og allir bátar, ið eru fevnd av nevndu lóg um bjargingarútgerð áopnum bátum og á førum undir 20 tons, sum hava VHF-tól umborð í brúki, skulu hava fólk, sum passa tólið. Vísandi til fjarskiftislógina skulu fólk hava loyvi til at nýta VHF-frekvensir, og til hetta krevst, at viðkomandi hevur lokið neyðugt prógv. Treytirnar fyri at standa royndina, eru ásettar av ITU í altjóða radiofyriskipani, Radio reglulations, og Fjarskiftiseftirlitið er próvdómari til hesar próvtøkur, sigur landsstýrismaðurin.

Hann vísir á, at sambært IMO GMDSS Masterplan 1995, er altjóða viðtikið, at 1. februar 2005 heldur tann kravda lurtivaktin á rás 16 uppat, men at hendan ásetingin møguliga verður útskotin í nøkur ár. Í staðin kemur so GMDSS VHFDSC skipanin í gildi.

- Tórshavn Radio er útgjørt við hesi skipan og eisini fleiri føroysk skip og bátar. DSC-skipanin merkir, at lurtivaktin er digital (talgild) á VHF-rás 70. Einki er tó, sum forðar fyri, at føroyskir myndugleikar taka avgerð um, at lurtivaktin skal halda fram á rás 16 við atliti til føroysk viðuskifti, sigur landsstýrismaðurin.

## Nýggj skipan

- Tann nýggja VHF-DSC-skipanin, sum longu er sett á stovn hjá Tórshavn Radio, virkarumborð á bátum á tann hátt, at tá ið menn trýsta á ein neyðknøtt á tólinum, fær Tórshavn Radio og bátar, sum eru útgjørdur við VHF-DSC-tóli, boð um neyðstøðuna beinanvegin. Er VHF-DSC-tólið íbundið ein GPS'ara umborð, fær Tórshavn Radio og aðrir bátar við somu tólum boð um neyðstøðuna beinanvegin. Eisini verður positiónin fráboðað.

Landsstýrismaðurin heldur tað vera ógvuliga týdningarmikið, at positiónin beinanvegin verður staðfest í neyðstøðuni, tí tá kunnu bjargingarfør og tyrlur sigla ella flúgva til neyðstaðið beinanvegin.

- Eftirfylgjandi samskiftið verður tá sum áður at fara fram á VHF-rás 16.At enda upplýsir landsstýrismaðurin, Bjarni Djurholm, at umleið 4.200 føroyingar hava prógv, ið gevur loyvi til at brúka VHF-útgerð.

HYGG HER
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Brúktir bilar til sølu
Citroen Jumpy 1,9TD 8 ferðandi
km. 28.200, árg. mars 2000
190.000,-
Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-
Citroen Xantia II 2,0 HDi 5H
km. 75.000, árg. aug. 1999
162.000,-
Citroen Xantia II 2,0 HDi stc. 5H
km. 100.000, árg.sept. 1999
158.000,-
Sosialurin - 311820
Citroen Xantia Exclusive 3,0 V6
km. 62.500, árg. juni 1998
165.000,-
Citroen Xsara 2,0 HDi 5H
km. 20.000, árg. sept. 1999
153.000,-
Citroen Xsara 2,0 HDi stc. 5H
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-
Mitsubishi Colt 13GLXi 3h
km. 230.000.
15.000,-
Mitsubishi Galant 2,0 GTi 4h
km. 170.000, árg.mai 1989
Sýnaður 09'01 50.000,-
Mitsubishi L300 2,5D Vøruvognur
km. 161.000, árg.juni 1994
80.000,-
Fiat Tipo 5H
km. 109.000, árg. mai 1989
Sýnaður 11'01 26.000,-
Ford Escort 1,8i 16V 5H
km. 80.000, árg. juli 1996
70.000,-
Ford Sierra 2,0i CLX 4h
km. 110.000, árg. nov. 1991
45.000,-
Peugeot 306 D 4H
km. 150.000, árg. apr. 1995
80.000,-
VW LT31 vøruvognur
km. 148.000, árg. okt. 1993
v/ mvg 55.000,-
OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ
Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo